# Taka uppgávuna í álvara




*Hóast talan at síggja til bert var um lætta venjing, so eydnaðist okkum ikki at fáa rættiligt orð á nakran í rumenska landsliðshópinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Væl vaksnir eru teir í øllum førum. Rumensku landsliðsleikararnir, sum fríggjakvøldið og sunnudagin skulu royna seg móti okkara útvaldu landsliðsleikarum.

Hósmorgunin hevði rumenska landsliðið eina heldur lætta venjing, har tað mest av øllum var líkt til, at teir vildu rysta ferðamøðina av sær, og kanska fáa rørt kropparnir nakað, áðrenn uppgávurnar rættiliga byrja.

## Onga viðmerking

At teir taka uppgávurnar í álvara, tykist heldur ikki at vera nakar sum helst ivi um. Hóast talan at síggja til bert var um eina lætta stutta venjing, so høvdu hvørki venjari ella aðrir, sum vara av liðnum, stundir til at práta við okkum, meðan venjingin.

– After training, var einasta svarið, sum vit báðir, myndamaðurin fingu, tá vit royndu at fregnast eitt sindur um, hvussu teimum dámdu umstøðurnar og uppihaldið í Føroyum.

Tíverri rakk hetta út um evstamark okkara, so tað verður ikki fyrr enn í týsdagsblaðnum, at vit fáa meira at vita um rumenska liðið.

Eftir er bert at vóna, at talan verður um tveir spennandi og væl leiktar hondbóltsdystir, har føroysku leikararnir fara at prógva, at landa- og mansstødd ikki nýtist at verða avgerandi fyri, hvussu liðini bæði roynast á vøllinum.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag og leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul millum norðan og eystan, eitt skifti lot til andøvsgul av ymsum ættum. Skýggjað við regni ella ælaveðri. Hitin alt samdøgrið umleið 5 stig.




**Veðrið sunnudagin, mánadagin og týsdagin:**
Fyri tað mesta gul til stívt andøvsgul millum norðan og eystan. Skýggjað og ælaveður, sum frá líður partvís sum vátaslettingur. Hitin fellur til millum 1 og 4 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷1 |
| Nuuk | - |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | ÷16 |
| Saint John's | - |
| Halifax | - |
| Reykjavík | ÷9 |
| Seyðisfjørður | ÷2 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 7 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 8 |
| Oslo | - |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | ÷2 |
| Berlin | 6 |
| Warzawa | 1 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 15 |
| Athen | 15 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | ÷3 |
| New Dehli | 12 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | - |
| New York | ÷1 |
| Miami | 15 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 14 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | - |
| Buenos Aires | 33 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst yvir Grønlandi og eitt lágtrýstumráði nær Bretsku Oyggjunum standa mest sum í stað.




Eitt lágtrýst fer um vikuskiftið frá Norðsjónum móti Miðskandinavia. Kaldari luft rekur inn yvir Føroyar norðaneftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 03/01 kl. 06⁰⁰-04/01 kl. 06 ⁰⁰. Hitin í gjár: 6,3°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

## AVFALL




Avfallið: 10,0 mm - mált frá 03/01 kl. 06 ⁰⁰-04/01 kl. 06 ⁰⁰
Avfallið higartil í januar: 37,3 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

28. des.: Mánin longst frá jørðini
2. jan.: Fyrra kvarter
4. jan.: Jørðin næst sólini
9. jan.: Fullmáni
10. jan.: Mánin næstur jørðini

Kelda: Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. jan | 02:27 | 14:49 | 01:27 | 13:49 | 01:42 | 14:04 | 04:27 | 16:49 | 05:27 | 17:49 | 00:42 | 13:04 | – | 12:04 | 02:42 | 15:04 | 03:42 | 16:04 | 02:12 | 14:34 | 03:27 | 15:49 |
| 6. jan | 03:11 | 15:35 | 02:11 | 14:35 | 02:26 | 14:50 | 05:11 | 17:35 | 06:11 | 18:35 | 01:26 | 13:50 | 00:26 | 12:50 | 03:26 | 15:50 | 04:26 | 16:50 | 02:56 | 15:20 | 04:11 | 16:35 |
| 7. jan | 03:59 | 16:25 | 02:59 | 15:25 | 03:14 | 15:40 | 05:59 | 18:25 | 06:59 | 19:25 | 02:14 | 14:40 | 01:14 | 13:40 | 04:14 | 16:40 | 05:14 | 17:40 | 03:44 | 16:10 | 04:59 | 17:25 |
| 8. jan | 04:52 | 17:18 | 03:52 | 16:18 | 04:07 | 16:33 | 06:52 | 19:18 | 07:52 | 20:18 | 03:07 | 15:33 | 02:07 | 14:33 | 05:07 | 17:33 | 06:07 | 18:33 | 04:37 | 17:03 | 05:52 | 18:18 |

fk